# Afturvendandi felagsnevnarar

**Tað eru ávís nøvn, sum ganga aftur í feløgum og samtøkum, og eru at síggja í samband við tað, sum hendir í og kring Framtaksgrunnin í løtuni. Ein felagsnevnari er grannskoðaravirkið, sum nýggi formaðurin í Framtaksgrunninum arbeiðir hjá**

ANALYSA
*Edvard Joensen*

Líka síðan kreppan í fiskivinnuni byrjaði, hava verið royndir gjørdar at keypa ymsu flakavirkini í landinum. Framtaksgrunnurin gjørdist úrslitið, og Føroya Fiskavirking aftur eitt úrslit av honum.

Men longu tá vóru aðrir bólkar, sum arbeiddu við at fáa hendur á virkjunum. Og tá hugt verður afur at hesum, eru ávísir felagsnevnarar, sum ganga aftur.

Eisini í tí, sum hendir í dag, eru somu felagsnevnarar uppi aftur. Ein er advokatvirkið í Fr. Petersensgøtu í Havn, og ein annar er grannskoðaravirkið Rasmussen og Weihe.

Keldur, sum eru innalaga í tí, sum nú hendir, siga fyri Sosialinum, at grundaður gruni er um, at ávís reiðaravirki í Eysturoynni eru partar av tí spæli, sum hevur verið og enn er. Nevnd verða serliga trý reiðaravirki, sum hava áhuga í at keypa partar av samtakinum Føroya Fiskavirking.

Hesi trý virkini, sum nevnd verða, eru Snaraløkur, Beta og Sjóborg, sum hava tilsamans 16 trolarar, ið allir hava støð í Runavík.

Somu feløg hava tikið seg sama við sølufelagnum Fofish, sum skal selja fiskin hjá hesum 16 trolarunum, feløgini eiga.

Felags fyri øll hesi feløg er, at advokatar teirra arbeiða hjá advokatvirkinum í Fr. Petersensgøtu. Hjá tveimum reiðaríum umframt sølufelagnum er Grannskoðaravirkið Rasmussen og Weihe grannskoðari.

Serliga er tað eitt navn, sum gongur aftur í øllum hesum feløgum, og er tað advokaturin Niels Winther Poulsen, sum mikudagin varð valdur formaður í nevndini fyri Framtaksgrunnin.

Tá flakavirkið Lynfrost fór á húsaganga undir kreppuni, varð Niels Winther Poulsen settur kurator. Stjóri í Lynfrost í hesum tíðarskeiðnum varð Jónsvein Knudsen, sum í dag er reiðari á fleiri av skipunum, sum Lynfrost tá átti. Í dag undir felagnum Snaraløki.


*Nýggi nevndarformaðurin í Framtaksgruninum er at finna sum advokatur hjá fleiri feløgum, sum hava potentiellan áhuga í at keypa ognir hjá Framtaksgrunninum*

Samstarvsfelagi hjá Snaraløki í sølusamtakinum, sum selur gjøgnum Fofish er millum annað reiðaríið Beta, har sami Niels Winther Poulsen er advokatur.

Hin samtarvsfelagin, Sjóborg, hevur eisini advokat frá sama advokatfelag, nevniliga Magnus Petersen.

Hjá nýggja sølufelagnum Fofish eitur advokaturin Niels Winther Poulsen, og grannskoðari er Rasmussen og Weihe.

Hóast bæði stjórin í Sjóborg og stjórin í Snaraløki siga heilt greitt, at teir ikki hava nakrar ítøkiligar ætlanir um at keypa virki burtur úr Fiskavirking, eru aðrar góðar keldur hjá blaðnum, sum siga, at grund er til at halda, at tað er júst tað, sum arbeitt verður við.

Stjórin í Beta er burturstaddur, og tað eydnaðist ikki at fáa orð á hann, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Jónsvein Knudsen, stjóri í Snaraløki, sigur við Sosialin, at hann er kunnugur um aðrar partar, sum vilja keypa partar av ognum Framtaksgrunsins, nevniliga Fiskasøluna.

Samstundis eru kreftir, sum arbeiða fyri at leggja Fiskasøluna og Fiskavirking saman. Grundin her skal vera, at Fiskasølan er ov lítið verd einsamøll, og at eini tvey fiskavirki høvdu munað væl uppií.

Hesi virki verða søgd at vera virkini við Skálafjørðin, tey bæði fyrrverandi Lynfrost og Nykur.

Hóast partarnir, sum sagdir verða at standa aftan fyri hesar ætlanir, staðiliga avsanna, at nakað er í hesum, benda upplýsingar, blaðið liggur inni við, greitt á, at ikki rýkur heilt av ongum brandi.

Víst verður til tagnarskyldu bæði í Framtaksgrunninum og Vinnumálastýrinum. Men í báðum støðum verður tó váttað, at ymsir fyrispurningar hava verið.

Nýggi nevndarformaðurin í Framtaksgrunninum hevur heilt greitt áhugamál í fleiri av feløgunum, sum hava verið uppi í ymsum ætlanum og fyrispurningum í samband við keyp av ognum hjá Framtaksgrunninum.

Keldur hjá Sosialinum vísa á, at grund er til at halda, at valið av nevndarlimum í Framtaksgrunninum ikki stendur í vegin fyri, at landsstýrismaðurin við vinnumálum fær framt politiska vilja sín við at selja burtur av ognunum hjá grunninum.

# Ósannindi av grovasta slag

**Høgni Hoydal, varaløgmaður, sigur tað vera ósannindi av grovasta slag, tá Bjarni Djurholm landsstýrismaður við vinnumálum sigur, at varaløgmaður á landsstýrisfundi hevur mælt til at koyra nevndina í Framtaksgrunninum frá**

ÓSEMJA
*Edvard Joensen*

Hetta eru so grov ósannindi, at tey ikki kunnu standa ósvarað, sigur Høgni Hoydal í viðmerking til tað, Bjarni Djurholm segði við Sosialin í gjár, har hann førdi fam, at Høgni Hoydal á landsstýrisfundi hevði biðið Bjarna Djurholm koyra nevndina í Framtaksgrunninum frá.

Høgni Hoydal sigur, at Landsstýrið er ikki kunnað um broytingar í nevndini í Framtaksgrunninum, sum má metast at vera ein tann týdningarmesta nevndin í Føroyum.

– Eg hvørki havi ella ætli at leggja meg út í arbeiðið hjá Framtaksgrunninum. At løgmaður er kunnaður, ger als ikki arbeiðið hjá landsstýrismanninum meira trúverdugt, sigur hann.

Hann sigur, at tann regla er galdandi í landsstýrinum, at kunnað verður um setanir av nevndum -ikki tí at landsstýrið skal taka støðu, men tí at landsstýrið skal verða kunnað um grundgevingar og mannagongdir i ymsu málunum.

Tá ein landsstýrismaður sleingir slík ósannindir út, sum Bjarni Djurholm kom við í gjár, bendir alt á, at hann als ikki skilur, hvør uppgávan hjá honum er - og at hann ger sínar gerðir upp eftir berum partapolitikki, sigur varaløgmaður.

*Orðini hjá Bjarna Djurholm eru so grov ósannindi, at tey kunnu ikki standa ósvarað, sigur Høgni Hoydal*



Høgni Hoydal sigur, at tann stóri trupulleikin í hesum máli er, at landsstýrismaðurin við vinnumálum leggur seg politiskt út í arbeiðið hjá eini nevnd, sum skal virka eftir fakligum og handilsligum kriterium. Tá er stórur vandi fyri, at partapolitisk atlit aftur vera avgerandi í føroyskum vinnnulívi, heldur enn handilslig og vinnulig atlit.

Tað er skyldan hjá landsstýrismanninum, tá hann setur nevndir, at hann hevur greiðar fakligar innstillingar og sakligar metingar frá embætisverkinum, sum grundgeva fyri valinum. Og ikki, at hann er ónøgdur av partapolitiskum orsøkum.

Hetta málið bendir á, at landsstýrismaðurin roynir at blanda seg uppí nakað, sum hann skal halda seg frá, sigur Høgni Hoydal varaløgmaður í viðmerking til Bjarna Djurholm.



# Misti ringin á føðideildini

**Í mikudagssosialinum stóð at lesa um ein føroyskan giftiring, sum løgreglan í Esbjerg hevði fingið hendur á. Lýst varð eftir eigaranum, og longu dagin eftir ringdi ringaánarin á Sosialin**

BURTURMIST/FUNNIÐ
*Ingrid Bjarnastein*


*Mourentsa í Grund í Syðrugøtu átti ringin, sum løgreglan í Esbjerg fann í eini húsarannsókn um vikuskiftið*

*Mynd: Jens Kristian*

Tey møttust niðri á Skarv í Keypmannahavn fyri júst 20 árum síðani. Mourentsa og Manbjørn. Hon er ættað úr Havn og hann úr Søldafirði, og um hesa tíðina arbeiddi hon á Skipafelagnum í Danmark og um vikuskiftini vaskaði hon á Skarv.

Henda dagin í apríl, beint tá Skarv skuldi lata upp, sótu Mourentsa og ein vinkona og hvíldu seg eftir at hava gjørt reint. Tá koma nakrir mans inn, og millum teir er Manbjørn, sum saman við nøkrum vinmonnum hevur verið sunnanfyri og ferðast. Mourentsa og Manbjørn fella í prát, og góð tvey ár seinni giftast tey í Gøtu kirkju. Tann 7. september 1984, júst sum stóð í ringinum.

## Ringurin vekk

Manbjørn og Mourentsa eiga trý børn. Tá hon lá á føðideildini um mánaðarskiftið mars/apríl í 1985 eftir at hava átt sítt næsta barn, misti hon ringin vekk.

– Eg lá á føðideildini, og so skuldi eg út at tosa í telefon, greiðir Mourentsa frá.

– Meðan eg var við barn, var eg hovnað so mikið, at eg fekk ikki havt ringin á, so hevði tikið hann av, og hongt hann í eina gullketu, sum eg hevði um hálsin. Men hesa ketuna hevði eg ikki um hálsin tá eg svav, og tí lá hon, við ringinum, á náttborðinum við síðuna av songini. Tá eg so kom aftur eftir at hava tosað í telefon, vóru ketan og ringurin vekk. Sjúkrasystrarnar á deildini hjálptu mær at leita, vit endavendu songini, leitaðu allastaðni, men ketan og ringurin vóru vekk, so hetta var eg sjálvandi kedd av. Tað varð eisini leitað á vaskarínum, og eg var fleiri ferðir aftur á deildini og fregnaðist, um ringurin nú kanska var komin afturíaftur. Og av tí, at eg lá einsamøll inni á stovuni, so var ongin, sum kundi siga mær, hvør hevði verið inni har, meðan eg var og tosaði í telefon.

Men so var ikki. Ringurin var burtur. Mourentsa var eisini á politistøðini fleiri ferðir fyri at vita um nakar var komin við ringinum har. Men ongin ringur. Tó ikki so, Mourentsa fór ikki tómhent aftur av føðideildini. Við sær hevði hon sonin, sum seinasta leygardag fylti 17 ár.

## Gav upp

Eftir fleiri vitjanir bæði á føðideildina og politistøðina gav Mourentsa upp at leita eftir súmbolinum uppá giftarmálið millum hana og Manbjørn.

– Eg var sjálvandi kedd av, at ringurin varð vekk, men tað var ikki nógv at gera. Men eitt lítið ár aftaná, meðan vit vóru stødd til eina brúðarvígslu í Vesturkirkjuni, fiskaði Manbjørn ein nýggjan ring upp úr lummanum, so tað var sjálvandi eisini romantiskt í sær sjálvum. So eg havi ikki gingið uttan ring tey seinastu seytjan árini.

– Tað, sum eg haldi er so løgið er, at tað eru júst 17 ár síðani at ringurin hvarv, og at hann nú er funnin. Hetta hevði eg als ikki væntað.

## Funnin aftur

Týsdagin á middegi ringdi telefonin á løgreglugarðinum í Havn. Løgreglan í Esbjerg var komin fram á ein giftiring, sum teir hildu onkur føroyingur átti. Teir vóru komnir fram á ringin í eini rannsókn heima hjá eini danskari kvinnu, sum varð mistonkt fyri folabrotsverk (hæleri). Har funnu teir alskyns prýðislutir, og føroyski giftiringurin var tann einasti teir veruliga kundu identifiserað.

– Løgreglan í Esbjerg sigur, at teir hava eina rúgvu av ringum liggjandi, sum teir ikki finna eigaran til, men av tí, at "Manbjørn" stóð í ringinum hildu teir, at hetta helst mundi vera føroyskt. Teir høvdu tó misskilt tað eitt sindur, tí í ringinum stóð "Tín Manbjørn", og hildu teir, at Manbjørn var eftirnavnið og tín fornavnið, greiðir Andras Poulsen á politistøðini í Havn frá.

– Vit hava onga hóming av, hvussu ringurin kann vera endaður í Esbjerg, men løgreglan har niðri heldur, at danska kvinnan hevur keypt ringin frá onkrum misnýtara fyri ein bíligan penga. Ringurin hevur uttan iva skift hendur nakrar ferðir áðrenn hann endaði so langt vekk, sigur Andras.

Tey, Sosialurin hevur tosað við, halda øll, at hetta er ein sera stuttlig hending, og eisini løgreglan í Esbjerg hevur víst áhuga fyri málinum. Teir hava biðið løgregluna í Havn um eitt eintak av greinini í Sosialinum, sum teir so sleppa at síggja. Ein løgreglumaður í Esbjerg er giftur við føroyskari kvinnu, og hon er so sett at umseta fyri teimum.

Men fegnast av øllum munnu Manbjørn og Mourentsa vera.

– Tá Manbjørn kom heim týsdagin sá eg, at hann hevði eitt so løgið smíl, fortelur Mourentsa flennandi. – Hann hevur Sosialin í hondini, og vísir mær so, hvat í har stendur. Men tá hevði eg longu frætt um tað.

Løgreglan í Esbjerg sendir ringin til Havnar, og har kann Mourentsa fara eftir honum fyrsta dagin.

– Eg vænti, at eg taki tann gamla ringin á. Tað er hóast alt ikki tað sama at ganga við hinum ringinum, so eg haldi, at eg eigi, at taka tann gamla á, sigur Mourentsa, sum er rættiliga bilsin yvir gongdina við ringinum, at enda.